# Løgmaður slóðar fyri útbúgvingarsamstarvi við ES

**Ján Figel, ES-nevndarlimur í útbúgving, hevur játtað ynskjunum hjá Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, um at Føroyar skulu vera við í ymiskum útbúgvingarskipanum í ES**

ÚTBÚGVINGAR



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Ján Figel, ES-nevndarlimur í útbúgving, eftir fundin í Brússel í gjár*

Føroyar hava í eina tíð roynt at gerast formligur samstarvspartur í nýggju ES-skipanini "Lívslong læra", sum kemur í gildi 1. januar komandi ár, og sum fevnir um alt útbúgvingarsamstarv í ES.

Higartil hevur tó verið striltið at fáa ES at ganga føroysku ynskjunum á møti. Eftir fund í gjár við Ján Figel, ES-nevndarlim í útbúgving, er glottar nú kortini at hóma.

**Ikki fullan limaskap**

Í fyrstu syftu verður valla talan um fullan limaskap í »Lívslangari læru«. Ján Figel lovaði tó at senda ES-kervinum boð um, at Føroyum skal standa í boði at vera við í úrvaldum útbúgvingarskipanum. Nevndarlimurin legði dent á, at fáa Føroyar ikki fullan limaskap í hesi atløgu, so fer ES at royna sítt ítarsta at fáa Føroyar við í bróðurpartin av skúlasamstarvinum í ES. Hetta verður gjørt við sínámillum avtalum. ES hevur útbúgvingarsamstarv á øllum stígum, og nú skulu partarnir fáa greiðu á, hvørj øki eru viðkomandi fyri Føroyar. Landsstýrið arbeiðir eisini við at fáa ein nýggjan, yvirskipaðan samstarvskarm við ES, sum skal lata dyrnar upp fyri munandi tættari sambandi við samveldið innan eitt nú gransking, mentan, loftferðslu og tey fýra frælsini.

**ave**

# Jóhan Martin sýnir framsýning í Snarskivuni



*Í morgin kl 16 letur upp framsýning hjá Jóhan Martini Christiansen »From inner - into outer space« upp í Snarskivuni hjá Tórshavnar Býráð*

Hósdagin 4. mai 2006, kl. 16 letur upp framsýning í Snarskivuni við verkum hjá Jóhan Martini Christiansen. Framsýningin heldur á í 3 vikur og ber heitið "From inner - into outer space".

Á framsýningini vera akryl málingar, ið eru málaðir yvir tað heitið, framsýningin ber. Heitið boða frá einum gjøgnumgangandi evni, ið arbeitt er við. Málningarnir endurspegla tað ævi, sum fer framvið hjá menniskjum, trøini og prikkarnir sipa til hetta.

# Royna gagnnýtslu av vindorku í Nólsoy

**Sum partur av arbeiðinum at orða orkupolitikk, hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum tikið avgerð um, at Nólsoyggin skal nýtast sum royndarøki fyri øktari gagnnýtslu av vindorku til streymframleiðslu**

Sum ein liður í verkætlanini varð ein vindmátari í mars mánaði í ár settur upp úti í Nólsoy. Verkætlanin, sum ber heitið "Muligheder for fornybare energisystemer og hydrogenteknologi i Vest-Norden" hevur valt at kanna økir í Føroyum, Grønlandi og Íslandi. Fyrsti partur av verkætlanini fevndi um eina kortlegging av orkustøðuni í londunum, og vísti eisini á, hvørjar møguleikar londini hava fyri størri gagnnýtslu av varandi orku.

Niðurstøðan í frágreiðingini nevndir møguleikan fyri einum royndarverki í Nólsoy, sum kann gagnnýta vindorku partvís til streymframleiðslu beinleiðis á el-kervinum, og partvís til framleiðslu av vetni.

Annar partur av verkætlanin fevnir um innsavnan av hagtølum, m.a. frá vindmátingunum. Ein týðandi partur av verkætlanin er, at tey, sum búgva á støðunum, gerast partur av verkætlanini. Tí arbeiða skúlabørnini í 9. flokki í Nólsoyar skúla í hesum døgum við orku, har tey m.a. skulu savna hagtøl fyri orkunýtsluna í einstøku húsarhaldunum í bygdini. Við støði í hagtalsgreiningini skal uppskot gerast til, hvussu vindorkan kann nýtast til veiting av ravmagn og hita í Nólsoy, sum skal verða grundarlag fyri støðutakan um uppsetan av royndarverki og figgingarmøguleikum.

Hesin parturin av verkætlanini verður væntandi liðugur um eitt ár – á sumri 2007.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fegnast um, at vindmátingarnar eru byrjaðar og sigur: "at úrslitið av verkætlanini vónandi verður, at Nólsoygging í framtíðini fær allan sín orkutørv frá varandi orkukeldum, og á tann hátt kann verða ein fyrimynd fyri onnur oyggjasamfeløg í útnorðri".

Kunningarfundur um Nólsoyarverkætlanina verður í Nólsoy í annaðkvøld, har landsstýrismaðurin m.a. fer at greiða frá arbeiðinum við at orða orkupolitikk fyri Føroyar, og hvussu hendan verkætlan passar inn í tað arbeiðið, sigur Vinnumálaráðið í tíðindaskrivi.

**Sethús í Hoydølum til leigu**



Húsini á Hvítanesvegnum 11 í Hoydølum verða við hesum lýst til leigu.

Húsini eru tilsamans 172 fermetrar, og grundstykkið er 1066 fermetrar.

**Húsini eru innrættað soleiðis:**
Miðhædd: Forstova, stór gongd, tvey wc/bað, køkur, stór stova, fýra kømur, fýrrúm/bryggers. Á loftinum er stór stova og eitt kamar. Talan kann gerast um tvey leigumál eftir nærri avtalu.

*Nærri fæst at vita við at ringja 216409*

SUNDA KOMMUNA

**Leiðari til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík**

Sunda kommuna søkir eftir leiðara til dagstovnin, at byrja tann 1. juni 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og tann setti skal hava námsfrøðiliga útbúgving.

Dagstovnurin er skipaður sum ein felags eind, við børnum frá 0 til 10 ár.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur hug og hegni at leiða, dugir at samstarva og ert fyrikomandi.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og foreldrunum.
- At tú hevur hug at skapa og seta dám á okkara dagstovn.
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á sosialu deild, tlf. 471022 ella 771023.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2006, og skulu sendast til:

**Sunda kommunu**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki.

Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík er ein av trimum dagstovnum í Sunda Kommunu. Dagstovnurin er normeraður til 58 børn, hevur eitt ár á baki, og har eru í løtuni 11 starvsfólk. Dagstovnaleiðarnir á økinum, tvs. í Hósvík, á Oyrarbakka og í Hvalvík, hava eitt gott og tætt samstarv á økinum í samráð við kommununa.